# Stikkan – Føroya størsti tógvhandil

Fyri fólk við áhuga í binding er Stikkan eitt satt paradís at koma inn í. Við tí stóra úrvalinum og nógvu modellunum ber næstan ikki til at fara tómhentur út aftur.

Stikkan byrjaði í Havn fyri umleið hálvum øðrum ári síðani. Frammanundan var handilin á Eiði. Tey, ið eiga handilin, eru hjúnini Katrin Haraldsen og Mortan Mortensen.

Katrin Haraldsen er útbúgvin Tekstil Designari og arbeiðir við at gera mynstur. Tað mynstrið, ið kanska er best kent, er "ermaleysi" vesturin við rundum akslastykki. Vesturin bleiv gjørdur fyri einum ári síðani, men ikki fyrrenn nú slær hann ígjøgnum. Fleiri hava sjálvsagt tikið vestin til sín og lagt ymisk mynstur í akslastykkið, og Katrin Haraldsen metir tað vera sera jaligt, at mynstrið er so væl móttikið.

Handilin hevur eisini eina heimasíðu. Har ber til at skriva mynstur út frá Drops og Ístex. Annars er síðan bert upplýsandi.

Síðani handilin flutti til Havnar, er kundaskarðin og sølan vaksin sera nógv. Kundarnir eru jaligir og inspirerandi og vitja trúliga inn á gólvið. Arbeitt verður alla tíðina við at menna og útbyggja handilin, siga eigararnir.

Bindimaskinur av merkinum Silver Reed eru eisini at fáa. Av tógvi kunnu nevnast merkir sum: Isager, Falkenberg, Sandnes, Drops, Ístex, Filana, Snældan, HP, Dale o.o. Sum nakað nýtt kemur Vivian Høxbro eisini. Sum nú er, eru fýra fólk knýtt at handlinum.



*Stikkan er Føroya størsti tógvhandil, og fyri fólk við áhuga í binding er handilin eitt satt paradís at komin inn í*




















